# Lions Club Suðuroy heiðrað



*Leivur Nygaard, formaður í Lions Club Suðuroy, tekur ímóti heiðursbrævinum, ið felagið hevur fingið fyri at vera ídnasta og virknasta felag í sínum øki, ið telur Føroyar, Grønland og størtsa partin av Sælandi*

*(Mynd: D.Olsen)*

**Í Føroyum eru nakrar deildir av Lions Club, ein teirra er í Suðuroynni. Henda hevur nú fingið heiðurin sum ídnasta og virknasta deild í sínum øki, ið telur Føroyar, Grønland og stóran part av Sælandi**

HEIÐURSTEKIN
*Dagfinn Olsen*

Lions Club er eitt altjóða samtak, sum to er býtt í smærri deildir. Í ríkinum eru nógvar deildir av hesum felagsskapinum og í Føroyum eru eini fimm Lions Klubbar.

Lions Club Suðuroy er partur av økinum, ið nevnist 106 D. Hetta fevnir um Føroyar, Grønland og Sæland, tó ikki Keypmannahavn.

## Heiður

Í heyst fingu feløgini í Føroyum vitjan úr Danmark, har økisleiðarin vitjaði føroysku Lions Klubbarnar.

Og nú hevur Lions Club Suðuroy fingið heiðursbræv, tí felagið er mett at vera ídnasta og virknasta felag í sínum øki, ið jú er rættiliga stórt.

Við fylgir bræv, har grundgeving og eydnuynski fylgja við, umframt heiðursbræv, diplom, og eitt merki til at heingja upp.

Á heiðursmerkinum stendur m.a. sum grundgeving fyri heiðurin, at felagið fær henda sum ...udmærkelse for kultur- og samfundsaktiviteter for bedste indsats i distrikt 106 D...

Og merkið ber áskriftina Lions Club International - cultural & community Activities.

Limirnir í Lions Club Suðuroy fegnast um heiðurin og viðurkenningina fyri ídni. Og sera fegnir eru teir, tí hetta er nýggj fyriskipan, og felagið er sostatt tað fyrsta, ið fær hesa viðurkenning og henda heiður vístan.

Lions Club Suðuroy varð stovnað í 1986.

Lesið Sosialurin -tað loysir seg

Sosialurin i Sosialurin



12. mai kl. 15.00 í Ítrottarparkini

FCK - Brøndby

Úr Føroyum 9. mai kl. 20.40
Aftur til Føroya 13. mai kl. 08.55

Prísur: kr. 1.995,-
við í prísinum er atgongumerki, rundtúr við Toda í Parkini og ferðaavgjald.
Avmarkað nøgd.

ROCKSHOW 2002
EYEQ, DEN GALE POSE, TV2 COWGIRLS, SAYBIA
FCK og RockShow skipa fyri konsert í Fælledparken í Keypmannahavn 11. mai.
Les meira á www.fck.dk

Sosialurin
í samstarvi við Atlantic Airways

ATLANTIC AIRWAYS
Tel. 34 10 40 · Fax 34 10 01
www.atlantic.fo

GAMAN
í Argja Skúla

Leygardagin 13/4-2002 frá kl. 15.00

Mattombola
Bommtombola
Café
Lutaseðlasøla
Klatriveggur
Hoppiborg
Fiskibrunnur
Hoppiborg
Ponyríðing
Sodavatnssøla

3.a í Argja Skúla





# Formula fo. meiri sjónligt í Klaksvík

**- Vit hava ikki verið so sjónligir í Klaksvík, men vónin er, at tað kann broytast, sigur Áki Johansen, sølumaður hjá Formula fo**

*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Áki sigur, at Formula fo. vónar, at tey kunnu gerast meiri sjónlig í Klaksvík. Og samstarvið við Allan Joensen er eitt stig á vegnum til tað.

– Vit eru væl nøgd við samstarvið við Allan og meta tað verða fruktagott, sigur hann.

– Vit hava ikki havt nakra serliga stóra sølu í Klaksvík, serliga tá tað kemur til privatfólk. Vit hava fingist meira við virkir innan fiskivinnuna. Og tað er jú heilt hvør sítt. Fyri tað fyrsta eru tað heilt aðrir pengar man tosar um, tá selt verður til virkir.

Hann sigur, at tað hava sjálvandi verið onkur privatfólk, sum tey hava selt til, men vónin, er altíð at kunna gera tað betri og gera meiri vart við seg.

– Klaksvík er eitt stórt øki, uttan fyri Havnina, sum avgjørt má takast í álvara, sigur Áki.

– Serliga, um hugsað verður um, tann komandi undirsjóvartunnilin, so kann ikki annað sigast enn, at Klaksvík fer at mennast munandi, heldur hann fram.

-– Higartil, hava tað sum oftast verið virkir, sum venda sær til okkara, men ætlanin er, at tað skal fara at verða hin vegin. Nú skulu vit bjóða okkum út til kundarnar, sigur Áki Johansen frá Formula fo.

## Tænastan betri

Við tað at Formula hevur fólk í Klaksvík, er tað munandi lættari hjá servisumonnunum at koma út til kundan.

Allan Joensen sigur, at tað at koma allan vegin úr Havnini norður til Klaksvíkar til ein teldu trupulleika, sum kanska tekur fimm minuttir at gera, er burtur við og nógv dýrari.

– Tú kanst ikki senda rokning til kundan upp á arbeiðsløn fyri ein heilan ella hálvan dag, tá tú hevur nýtt tað mesta av tíðini til at ferðast í og minst til títt arbeiði, vísir Allan á.

Formula fo. hevur eisini onkuntíð roynt at savna nakrar trupulleikar saman, áðrenn komið verður til Klaksvíkar. Men tá er tað so skjótt, at kundin gerst ónøgdur, so at tað er ongin ivi um, at tænastan verður munandi betri av samstarvsavtaluni millum Formula fo. og Allan Joensen.

## Eigur handilin

Allan Joensen eigur handilin sjálvur, men keypir alla útgerð gjøgnum Formula fo.

– Eg arbeiði meiri ella minni fyri teir, men eigi handilin sjálvur.

Allan hevði handilin í hølunum hjá Karl Nielsen, men har var alt ov trongligt. So fyri trimum vikum síðani, flutti hann í onnur høli.

Hann sigur, at tað koma nógv fleiri fólk inn á gólvið nú enn áðrenn hann flutti.

– Nú sær ein handilin betri, og har umframt eru handilsgluggarnir so nógv størri. Hesi hølini eru nógv rúmligari. Eg fái havt næstan alt, sum eg selji frammi, sigur Allan Joensen.




*Allan Joensen hevur ein mann aftur at sær til arbeiðis fyri Formula fo. í Klaksvík*

# Praktikantur selur ítróttarklæðir



STARVSVENJING
*Vár Gaard, Praktikantur*

– Her er ótrúliga gott at verða, og eisini ótrúliga fitt fólk at verða saman við, tey hjálpa mær um eg havi brúk fyri tí- sigur Bárður púra sannførdur á málinum. Hann er 16 ára gamal, av Strondum, gongur í 10. flokki og er í starvsvenjing í Havn.

Mikudagin vitjaðu vit Bárð, sum arbeiðir í ítróttarhandlinum hjá P/F Thomas Dam. Nakað av viðskiftafólki var inni so har var nógv at gera. Har sæst ein tilkomin kona, ið roynir einar nýggjar ítróttaskógvar, so hana fara vit at síggja á vegnum, hesar komandi dagarnar. Eisini er ein ung dama at síggja, hon roynir eina blusu.

Og Bárður er í sving, leypur aftur og fram millum hyllarnar sum hann ikki hevur gjørt annað og hjálpur onkrum við at finna tann rætta skógvin.

– Her er ikki akkurát so strævið at arbeiða, men alíkavæl nóg mikið at gera. Man er altíð í gongd. Um morgnarnar eru ikki so nógvir kundar, men tá skal eg rudda og støvsúgva o.s.fr. men tá eg so komi frá døgurðasteðginum ið er ein tíma, tá eru ofta nógvir kundar.

– Men tað er alíkavæl strævið hjá mær, tí eg má ferðast í millum hvønn dag, tí eg venji fótbólt.

Arbeiðsdagurin hjá Bárði byrjar kl 09.00 um morgunin, og er liðugur kl 17.30 ella 18.00 um kvøldið, so tað er ein langur dagur.

– Eg veit ikki rættuliga hvussu nógv fólk starvast her, men tað munnu verða uml. seks sum arbeiða í sjálvum handlinum, og so eru nógv fólk á lagrinum, og eisini nøkur skrivstovu fólk, so tilsamans eru tað nógv fólk. Og Thomas Dam er ikki bara ítróttur, men eisini so nógv annað, sum t.d Thomas Dam búnýti, og tað er heldur ikki bara ein ítrótta handil hjá Thomas Dam, men eisini aðrastaðni runt í landinum.

– Eg eri ikki so ofta har sum tey selja klæðir, tí eg dugi ikki so væl við klæðum, at siga hvat passar og ikki passar, men eg havi verði har onkuntíð. Eg dugi betur við skóm. Sigur hann við einum lítlum smílið á andlitinum.